| Gerðabók býráðsins | |
|---|---|
| Fundardagur: | 28. mai 2014 |
| Býráðsfundur nr. | 07/2014 |
| Borgarstjóri | Sonni á Horni |
| Fundarskrivari | Jákup Frants Larsen |
| | |

Ár 2014 tann 28. mai kl. 16.30 varð býráðsfundur hildin í býráðssalinum, hetta sambært skriv frá borgarstjóranum, dagfest 23. mai 2014 um innkalling til fundar.

**Møtt vórðu:**

Sonni á Horni
Magnus S. Midjord
Sigga Óladóttir Joensen
Sigurð S. Simonsen
Dánjal Vang
Petur Abrahamsen
Eyðun á Lakjuni
Árant Berjastein
Birgir Petersen

Við á fundinum luttók eisini Marin S. Thomsen, fíggjarleiðari.
Birgir Petersen møtti á fundinum kl. 16.55 eftir at avgerð varð tikin í máli nr. 14/2014.

**Skrivari:** Jákup Frants Larsen, býráðsskrivari

**Mál nr. 14/2014.**

**Mál viðvíkjandi roknskapi kommununar fyri 2013.**

Fuglafjarðar kommuna hevur tann 21. mai 2014 móttikið grannskoðaðan roknskap fyri kommununa saman við grannskoðarafrágreiðing fyri 2013 frá Januar – løggilt grannskoðaravirki, undirskrivaður av Fróða Sivertsen, statsaut. revisor og annars grannskoðaður av Snorra á Bøgarði, skrásettum grannskoðara.

Fíggjarnevndin hevur á fundi tann 21. mai 2014 gjøgnumgingið roknskapin og grannskoðarafrágreiðingina saman við fíggjarleiðaranum Marini Thomsen og Jákup Frants Larsen, býráðsskrivara og samanhildið roknskaparøkini saman við fíggjarætlan kommununar fyri 2013.

2 eykajáttanir eru framdar av býráðnum í árinum, og eru tær til rakstur av Mentanarhúsinum og til umbygging av læknahúsinum til dagtilhald fyri minnisveik tilsamans kr. 450.000,00, sum fíggjaðar eru av innistanandi peningi.

Hesar eru kunngjørdar Fíggjarmáláraðnum við skrivum, dagfestum 17. september 2013 og 29. november 2013.

Roknskapurin vísir eitt rakstraravlop áðrenn avdráttir upp á kr. 4.229.207,00 móti einum rakstraravlopi í 2012 upp á kr. 300.143,00.
Sambært høvuðsyvirliti í roknskapinum eru útgreiningarnar hesar og samanhildnar í mun til góðkendu fíggjarætlanina við framdum eykajáttanum í árinum:

| | Kontoheiti: | Roknskapur: | Fíggjarætlan | Munur +/- |
|---|---|---|---|---|
| 1 | Kommunal fyrisiting | -8.700.147,00 | -8.276.000,00 | 424.147,00 |
| 2 | Almanna- og heilsumál | -5.208.629,00 | -4.951.000,00 | 257.629,00 |
| 3 | Børn og ung | -9.558.748,00 | - 9.954.000,00 | -395.252,00 |
| 4 | Undirvísing | -3.738.771,00 | -3.176.000,00 | 562.771,00 |
| 5 | Mentan og frítíð | -6.147.625,00 | -5.604.000,00 | 543.625,00 |
| 6 | Teknisk mál | -5.354.639,00 | -4.891.000,00 | 463.639,00 |
| 7 | Kommunal virki | 901.320,00 | 506.000,00 | -349.295,00 |
| 1-7 | **Økið 1-7 tilsamans** | **-37.807.240,00** | **-36.346.000,00** | **1.461.240,00** |
| 20 | Rentukostnaður-netto | -3.198.917,00 | -3.760.000,00 | -561.083,00 |
| | **Økið 1-7 tilsamans** | **-41.006.157,00** | **-40.106.000,00** | **900.157,00** |
| 1-7 | NettoíÍløgur 1-7 | -9.110.904,00 | -22.255.000,00 | 13.144.097,00 |
| | **Samanteljing** | **-50.117.060,00** | **-62.361.000,00** | **12.243.940,00** |

| | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 25 | Avdráttir av lánum /fíggjarbroytingar | | -1.977.000,00 | -3.000.000,00 | | 1.023.000,00 |
| | **Samanteljing** | | **-52.094.060,00** | **-65.361.000,00** | | **13.266.940,00** |
| 20 | Skattainntøkur | | -53.671.297,00 | -50.867.954,00 | | 2.803.344,00 |
| | Lántøka/nýtsla innist. | | 0,00 | 13.700.000,00 | | -13.700.000,00 |
| | Kapitaleftirlønir vm. | | -674.998,00 | -800.000,00 | | 125.002,00 |
| | | | | | | |
| | Samantals: | | -54.346.295,00 | 65.367.954,00 | | -11.021.658,00 |
| | **Gjaldførisúrslit** | | **-2.252.236,00** | **-6.954** | | **-2.245.282,00** |

Annars eru íløgurnar útgreinaðar á blað síðu 7 í grannskoðaða roknskapinum.

Býráðið hevur annars samtykt eykafíggjarjáttan fyri tilsamans kr. 450.000,00 í árinum, og er henda, sum nevnt frammanfyri, fráboðað Fíggjarmálaráðnum, hetta sambært § 53, stk. 2.3. í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mei 2000 um kommunustýri (kommunustýrislógin).

***Býráðið/fíggjarnevndin er somuleiðis skrivliga kunnað um av fyrisitingini, at ein eykajáttan í flestu førum førir eina útreiðslu við sær, sum beinleiðis ávirkan á roknskap kommununar fyri 2013. Eykajáttanin er víst niðanfyri.***

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Øki** | **Framd eykajáttan:** | | **Upphædd:** | **Fígging:** | | **Endamál:** |
| | | | | | | |
| 6 | 12. september 2013 | | 150.000,00 | Innist. peningur | | Læknahúsini |
| 5 | 28. november 2013 | | 300.000,00 | Innist. peningur | | Mentanarhúsið |
| | | | | | | |
| | **Tilsamans** | | **450.000,00** | | | |

Eingin lántøka er framd í 2013.

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í fíggjarnevndini 21. Mai 2014, og mælir nevndin einmæld býráðnum til at góðkenna grannskoðaða roknskap kommununnar fyri 2013 uttan viðmerkingar. Grannskoðarafrágreiðingin verður send býráðslimum í trúnaði saman við málinum.

**Avgerð:**
Samtykt varð at taka undir við tilmælinum frá fíggjarnevndini og góðkenna roknskap kommununar fyri 2013. (8-0). Birgir Petersen møtti á fundinum eftir at atkvøðugreiðslan varð farin fram. Hann hevði boðað frá, at hann varð seinkaður, og hevði einki ímóti, at fundurin varð settur.

**<u>Mál nr. 15/2014.</u>**

**Mál viðvíkjandi barna- og ungdómstannrøktini.**

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið teldupost frá Mortani í Hamrabyrgi, tannlækna, dagfestur 12. mai 2014 saman við uppskoti til í skoyti til konsulentavtalu millum SP/F Mortan í Hamrabyrgi og kommununa fyri barna- og ungdómstannrøkt hetta sambært fund partanna millum tann 29. apríl 2014.

Avtalan, sum partarnir gjørdu tann 10. desember 2013 gongur út tann 30. juni 2014, og sambært ískoytinum, so kemur avtalan at verða longd við einum ári fram til 30. juni 2015 og kann ikki verða uppsøgd í hesum tíðarskeiði.

Somuleiðis er komið inn í ískoytisavtaluna, at tannlæknin somuleiðis kann nýta tannlæknahølini til privat tannlæknavirksemi, og kemur í hesum sambandi at ringa kommununi ávíst mánaðargjald. Allar útreiðslur í sambandi við privata tannlæknavirksemi tannlæknans eru kommununi óviðkomandi, og ber tannlæknin allar útreiðslur til tilfar, starvsfólk vm.

Avtala varð eisini gjørd um at seta tannlækna í starv ½ tíð tann 01. august 2014, men hevur tannlæknin fyri stuttum boðað frá, at viðkomandi hóast alt ikki tekur við starvinum.

Í hesum sambandi verður víst til avgerð á fundi í fíggjarnevndini tann 22. januar 2014 um viðurskifti í sambandi við privatpraksis hjá tannlæknanum, og sum kunngjørd er SP/F Mortani í Hamrabyrgi við skrivi, dagfestum 28. januar 2014, og sum býráðið er kunnað um.

Á fíggjarætlan kommununar fyri 2014 eru avsettar kr. 940.000,00 til barna- og ungdómstannrøkt, men sambært framrokningum, dagfestar 13. mai 2014, so verður mett, at samlaði kostnaðurin verður

kr. 1.834.880,61 ella kr. 894.880,61 hægri enn mett. Tó kann framrokningarkostnaðurin verða nakað lægri, eitt nú grundað á at allar útreiðslur kunnu verða tiknar við í eini framrokning.

Somuleiðis kann ein møgulig inntøka fyri leigu fyri privatvirksemi í kommunalu tannlæknahølunum geva ávísar inntøkur. Sostatt er metingin hjá fyrisitingini, at tann fyrsta tíðin frá januar-mai 2014 er lutfalsliga dýrari enn restina av árinum. Tó verður staðfest, at játtanin fyri 2014 er uppbrúkt, tá ið mai mánaði er lokin.

So ein eykajáttan má verða veitt so skjótt sum gjørligt, t.v.s. í juni ella august 2014, við tað at talan er um lógarkravdar tænastur til børn og ung.

Grrundin fyri hesum er, at sambært fíggjarætlanini varð mett, at kostnaðurin kom at verða ein eindarprísur, sum kommunan hevði goldið privatum tannlækna í sambandi við útlisitering, men staðfest er, at støðan síðan 01. desember ikki hevur verið henda, við tað at kommunan hevur sett tannrøktara í starv fulla tíð, hevur gjørt avtalu við Klaksvíkar kommunu um tannrætting vm, eins og ein avtala er gjørd við SP/F Mortan í Hamrabyrgi um konsulentvirksemi.

Haraftrat hevur kommunan keypt alt tilfarið, sum fyrrverandi tannlæknin hevði í síni goymslu til barna- og ungdómstannrøktina.

Mett verður somuleiðis, at lógin um broyting í barna- og ungdómstannrøkt – LL nr. 23 frá 06. mars 1998 verður broytt frá 01. januar 2015, soleiðis at kommunustýrið skal tryggja børnum og ungum undir 18 ár, sum búgva í kommununi møguleika fyri ókeypis fyribyrgjandi og viðgerðandi tannrøkt.

Sambært hesum so koma 2 árgangir av ungum inn aftrat við umleið 50 persónuim, so samlaða talið av børnum og ungum, sum skulu hava viðgerð sambært broyttu lógina umleið 400 í tali.

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í fíggjarnevndini tann 14. mai 2014 og mælir nevndin býráðnum til at góðkenna uppskot til ískoyti til konsulentavtaluna við SP/F Mortan í Hamrabyrgi, dagfest 10. desember 2013, so henda verður longd í eitt ár óuppsigilig frá 01. juli 2014 at rokna fram til 30. juni 2015.

Viðvíkjandi møguligari eykajáttan mælir nevndin býráðnum til at veita eina eykajáttan á kr. 900.000,00 til rakstur av barna- og ungdómstannrøktini fyri fíggjarárið 2014, hetta sambært § 41, stk. 2 í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri, grundað á fíggjarligu staðfestingarnar, og at talan er um lógarbundnar útreiðslur, hetta vísandi til løgtingslóg nr. 23 frá 06. mars 1998 um barna- og ungdómstannrøkt.

Staðfest er, at kr. 940.000,00 eru avsettar á rakstrarstaði 02.20.23.530.10 á konto 141001: "Keyp av vørum og tænastum", og við eini eykajáttan upp á kr. 900.000,00 verður upphæddin broytt til kr. 1.840.000,00.
Fíggingin verður fingin til vega av meirinntøku av kommunuskatti, rakstrarstað 20.52.11.530.01 konto 610001, hetta vísandi til grein 41, stk. 2 í omanfyri standandi lóg (kommunulógini).
Ein eykajáttan, sum henda, førir eina útreiðslu við sær, sum hevuir beinleiðis ávirkan á roknskap kommununar fyri 2014.

Tá ið talan er um eina eykajáttan, skal málið hava 2 viðgerðir í býráðnum við í minsta lagi 14 daga millumbili, hetta sambært § 41, stk. 2 í løgtingslóg nr. 87 frá 17 mei 2000 um kommunustýri, og skal endaliga avgerðin verða kunnað Fíggjarmálaráðnum í seinasta lagi 3 dagar aftaná samtyktina við 2. viðgerð, hetta sambært § 53, stk. 2,3 í somu lóg.

Eisini varð nevndin samd um at fara undir samráðingar, um at fáa gjørt broytingar í teimum sáttmálum sum kommunan hevur í sambandi við barna- og ungdómstannrøktina, soleiðis at kommunan á henda hátt framyvir kann lækka rakstrarútreiðslurnar.

**Avgerð:**
Samtykt varð at taka undir við tilmælinum frá fíggjarnevndini til ískoytisavtalu við SP/F Mortan í Hamrabyrgi til konsulentavtaluna , dagfest 10. desember 2014, sum longd verður við einum ári frá 01. juli 2014 til 30. juni 2015, somuleiðis ískoytinum um framleigu av tannlækahølunum til felagið til privata tannrøkt. (9-0). Somuleiðis verður tikið undir við tilmælinum frá fíggjarnevndini eykajáttan og beina málið til 2. og endaliga viðgerð á býráðsdfundinum 19. juni 2014. (9-0).

**Mál nr. 16/2014.**

## Uppskot til samstarvsavtalu fyri eldraøkið.

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið uppskot til samstarvsavtalu millum Eystur- og Fuglafjarðar kommunu, dagfest 30. apríl 2014, sum sent er Almannamálaráðnum, hetta sambært løgtingslóg nr. 20 frá 07. apríl 2014 um

kommunalt samstarv um heimatænastu, eldrarøkt vm, galdandi frá 01. januar 2015.
Sambært § 4, stk. 1 skulu kommunurnar áðrenn 01. mai 2014 endaliga verða skipaðar í góðkend kommunal samstarvsøki, ið hava til endamáls at umsita heimatænastu, eldrarøkt vm í avvarðandi kommunu.
Í § 4, stk. 2 stendur hvørji økir talan verður um, og sambært 3) verður Eysturoy eitt økið, tó undantikið Sunda- og Eiðis kommunur. Í stk. 5 stendur, at kommunal samstørv, ið ikki eru samsvarandi økjunum í stk. 2, skulu hava í minsta lagi 3000 íbúgvar.
Tað er júst út frá § 4, stk. 5, at ætlaða samstarvið millum Eystur- og Fuglafjarðar kommunur er gjørt út frá, við tað at hesar báðar kommunurnar hava ídag umleið 3.460 íbúgvar, og tessvegna halda seg til løgtingslógina.

Uppskotið er sum sagt sent Almannamálaráðnum tann 30. apríl 2014 við teirri viðmerking, at politiska viðgerðin av avtaluni um samstarv ikki er liðug enn, og tessvegna er uppskotið ikki endaligt. Mett verður, at endaliga uppskotið verður sent ráðnum soskjótt, sum tað er góðkent av báðum býráðunum mánaðarskiftið mai/juni 2014.

Sosiala nevndin hevur viðgjørt uppskotið til samstarvsavtalu fyri eldraøkið á fundi tann 05. mai 2014 og mælir nevndin býráðnum til at góðkenna fyriliggjandi uppskot við niðanfyri standandi ískoyti til § 3 við eyka stk.:
*"Avgerðir tiknar av stýrinum skulu tryggja eitt javnbjóðis tilboð á eldraøkinum, sum er til gagns fyri báðar kommunurnar og tryggja, at allar staðsetingar verða javnt býttar millum kommunurnar."*

Fíggjarnevndin hevur somuleiðis viðgjørt uppskotið til samstarv millum Eystur- og Fuglafjarðar kommunur á fundi tann 14. Mai 2014, og mælir nevndin býráðnum til at góðkenna uppskotið við teirri broyting til § 3, stk. 3, sum sosiala nevndin mælir býráðnum til í sínum áliti.

Fundur hevur verið millum býráðini í Eystur- og Fuglafjarðar kommunum tann 27. mai 2014 um uppskotið til samstarvsavtalu um bú- og heimatænastu, og koma broytingar at verða gjørdar til fyriliggjandi uppskot, hetta sambært viðmerkingum frá Almannamálaráðnum til samstarvsavtalur og fund partanna millum 26. mai 2014.

Tá ið arbeiðið er gjørt, verður nýtt uppskot lagt fyri býráðini til viðmerkingar, somuleiðis sum endaliga uppskotið verður sent Almannamálaráðnum til viðmerkingar/broytingar, áðrenn býráðini taka endaliga støðu í juni 2014. Landsstýriskvinnan í almannamálum skal hava góðkent avtaluna í seinasta lagi 01. juli 2014.

Semja varð eisini millum býráðini um, at lýst skal verða alment eftir leiðara til tænastuna skjótast gjørligt, soleiðis at viðkomandi, ið settur verður, kann fara undir arbeiðið við fakliga partinum av yvirtøkuni av eldraøkinum, sum sambært lógini verður 01. januar 2015.

Sambært § 3 í uppskotinum verður eitt stýri (nevnd) vald, hetta samsvarandi § 7 í løgtingslóg nr. 20 frá 07. apríl 2014. Í nevndini eru borgarstjórarnir og eitt umboð úr sosialu nevndini/trivnaðarnevndini umframt eitt umboð aftrat úr Eysturkommunu, sum skal verða kommunustýrislimur.

Á fundinum við Eysturkommunu varð avgjørt, at Fuglafjarðar býráð skjótast gjørligt skal velja sítt umboð hjá sosialu nevndini í samstarvsnevndina, og skuldi forkvinnan í sosialu nevndini tosa viuð nevndarlimirnar og koma við sínum uppskoti til býráðsfundin 28. mai 2014.

Nevndin hevur havt fund um málið tann 27. mai 2014 og mælir býráðnum til at velja Siggu Óladóttir Joensen, forkvinnu í sosialu nevndini sum lim í samstarvsnevndina valskeiðið út og Petur Abrahamsen, nevndarlim í sosialu nevndini sum varalim.

Avgerð:
Samtykt varð at góðkenna avgerðina á felags býráðsfundinum millum Eystur- og Fuglafjarðar kommunur tann 27. mai 2014 um leigu av sambýlunum og lýsan eftir leiðara til eldra- og heimatænastuna. (9-0)

Somuleiðis varð samtykt at taka undir við tilmælinum frá sosialu nevndini um at velja Siggu Óladóttir Joensen, forkvinnu í sosialu nevndini sum fastan lim í stýrið og Petur Abrahamsen, nevndarlim í sosialu nevndini sum varalim valskeiðið út, t.v.s. fram til 31. desember 2016. (9-0).

Annars gjørdi Sigga Óladóttir vart við, at avtala varð gjørd í stýrinum fyri barnaverndarsamstarvið, at formenninir í samstørvunum skulu verða valdir fyri 2 ár, soleiðis at skilja at kommunurnar býttu formanssessin sínamillum í valskeiðnum, og at sama kom at verða galdandi fyri samstarvið um bú- og heiamtænastuna. Hetta inniber, at formenn ikki samstundis kunnu sita í samstørvunum úr eini kommunu.

## <u>Mál nr. 17/2014.</u>

**Umsókn frá Ellu á Dalbø og Inga Weihe um byggiloyvi til sethús á matr. nr. 211s á Garðavegi 5.**

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið umsókn frá Ellu á Dalbø og Inga Weihe um byggiloyvi til sethús á matr. nr. 211s á Garðavegi 5 í Fuglafirði sambært hjáløgdum tekningum.

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í teknisku nevndini tann 13. Mai 2014 og mælir nevndin býráðnum til, at umsóknin verður gingin á møti soleiðis at:

1. Treytirnar í almennu byggisamtyktini fyri Fuglafjørð og kunngerð um brunaverju frá 9. apríl 1992 verða fylgdar.
2. Í hesum sambandi verður víst á, at øll búrúm skulu hava minst eitt vindeyga, sum kann latast upp við fríum opi, sum er minst 50 cm í breidd og 60cm høgt. Hædd + breidd á tí fría opinum skal vera minst 1,50 m2.
3. Parkeringpláss til 2 bilar skal verða inni á stykkinum, og hetta skal verða gjørt áðrenn flutt verður inn í húsini. Møguligt bilhús verður ikki roknað sum bilstøðil.
4. Ø 315 mm reinsibrunnur skal verða settur á báðar kloakkleiðingarnar áðrenn hesir verða veittir út av grundstykkinum.
5. Rottangi skal verða samb. leiðbeining frá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni og settur niður samb. vegleiðing um rottangauppseting. Eisini skal rundskriv dagf. 2. juli 1998 frá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni viðv. nýtslu av tilfari til dren verða fylgd.
6. Í sambandi við at ein rennandi á gongur gjøgnum grundstykkið, skilar kommunan sær rætt til at leggja ánna í rør gjøgnum grundstykkið. Hetta skal verða samskipað við útgrevstrar- og planeringsarbeiðinum.
7. Kloakkplanur skal góðkennast av teknisku deild og kloakkirnar skulu sýnast og góðkennast av teknisku deild, áðrenn tær verða tyrvdar.
8. Húsini skulu verða sett av teknisku deild.

Byggiloyvi er galdandi í 2 ár frá útskivingardegnum.

**Avgerð:**
Tilmæli frá teknisku nevndini varð samtykt. (9-0).

### <u>Mál nr. 18/2014.</u>

**Mál viðvíkjandi byggjan av felagshúsi hjá Kommunufelagnum.**

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið skriv frá Kommunufelagnum, dagfest 21. mars 2014, har greitt verður frá, at stýrið í felagnum á fundi hevur umrøtt hølisumstøðurnar hjá Kommunufelagnum.

Aftaná at Kommunufelagið og Kommunusamskipanin eru løgd saman frá 01. januar 2014 at rokna í eitt felag, so eru Barnaverndarstova Føroya og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið eisini vorðin partur av felagnum, og tessvegna er samlaða starvsfólkatalið økt.

Tey 12 starvsfólkini, sum nú eru knýtt at felagnum, rúmast ikki í bygninginum hjá Kommunufelagnum í Tórshavn, men sum eina fyribilsloysn eru partar av fundarhølinum gjørt til skrivstovur, men hetta verður ikki mett sum haldgóð loysn.

Tí mælir stýrið til, at farið verður undir at byggja Kommunufelagnum eitt nýtt høvuðssæti. Felagið hevur fingið í boði at keypa eitt grundøki við Kommansmýru, beint við síðuna av bygninginum hjá Banknordik.

Ætlanin er, at bygningurin skal verður umleið 650 fermetrar, og verður samlaði kostnaðurin mettur til umleið 15,0 mió. Mett verður eisini, at eitt frívirði við sølu av bygninginum í Tórshavn og Kvívík vil geva felagnum umleið kr. 1,5 mió., so talan er um ein nettobyggikostnað upp á umleið kr. 13,5 mió.

Mett verður, at eftir lutfalli í fólkatalinum, so verður okkara partur av íløguni umleið kr. 425.000,00.

Mælt verður til, at upphæddin verður fíggjað av limakommununum yvir 2 fíggjarár, men tað hevur síðan víst seg, at ávísar kommunur eru illa sperdar fíggjarliga, og tí verður arbeitt við øðrum leisti fyri hesar við eini munandi longri afturgjaldingartíð.

Málið fekk umrøðu á aðaldindi felagsins tann 04. apríl 2014.

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í fíggjarnevndini 14. mai 2014 og mælir nevndin býráðnum til, at tikið verður undir við ætlanini hjá stýrinum fyri Kommunufelagið um byggjan av nýggjum felagshúsi, sum mett verður at kosta umleið kr. 15,0 mió, og at fíggingin verður av einum nettokostnaði upp á kr. 13,5 mió.

Nevndin mælir býráðnum til, at kommunan avsetir kommununar part av byggingini á fíggjarætlanini yvir 2 ár – møguliga 2015 og 2016 og rindar partin til Kommunufelagið saman við mánaðar avrokningunum.

**Avgerð:**
Tilmæli frá fíggjarnevndini varð samtykt. (9-0).

Bókin lisin. Fundurin lokin kl. 19.00.

Magnus S. Midjord

Sigga Óladóttir Joensen

Árant Berjastein

Petur Abrahamsen

Dánjal Vang

Sigurð S. Simonsen

Eyðun á Lakjuni

Birgir Petersen

Sonni á Horni

Jákup Frants Larsen